# Met fyri jólakonsert



*Ongantíð hava so mong fólk verið til jólakonsert í Christianskirkjuni. 1.200 fólk inni í kirkjuni, og fleiri fóru avstað aftur, tí onki pláss var*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Ongantíð áður hava tað verið so mong fólk til jólakonsert í Christianskirkjuni**

JÓLAKONSERT

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Hetta er met fyri eina jólakonsert, segði ein av limunum í Klaksvíkar Hornorkestri beint eftir konsertina.

Onkur hevði hug at spyrja, um tað yvirhøvur nakrantíð hava verið so mong fólk inni í kirkjuni fyrr, men tað hava tað kortini. Men ongantíð til eina jólakonsert.

Tað bar illa til at telja fólkini í kirkjuni týskvøldið, men tey bæði sótu og stóðu allastaðni. Aftaná frættist eisini um fleiri, sum vóru farin heimaftur, tí har var onki pláss eftir inni í kirkjuni.

Børn stóðu uttanfyri og hugdu inn, meðan Eivør sang.

Virkandi formaðurin í Klaksvíkar Hornorkestri, Heri Ellingsgaard sigur, at konsertin bleiv, sum hann hevði væntað.

Fólk høvdu hug áðrenn konsertina at seta spurnartekin við, um tað mundu fara at koma líka mong, sum tað plaga, nú konsertin varð løgd eitt týskvøld í staðin fyri sunnukvøld, sum vanligt er. Men tað gjørdi ikki mun. Tí sum sagt so hava tað ongantíð verið so mong til jólakonsert fyrr. Spurningurin er so, um øll, sum komu høvdu passað inn, hvussu mong tey so høvdu verðið.

# Stjørnuparið vælnøgt

**Í øllum meldrinum eftir jólakonsertina týskvøldið fekk Sosialurin eitt lítið prát við stjørnurnar báðar á konsertini, Eivør og Pætur**

JÓLAKONSERT

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*– Tað var eitt serstakt upplivilsi at syngja fyri so mongum fólkum í kirkjuni í kvøld, siga Pætur og Eivør*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá konsertin var av, savnaðust nógv fólk í kirkjukjallaranum um stjørnuparið, Eivør og Pætur. Men hóast tey ikki høvdu góða tíð, so settu tey eina lítla løtu av til eitt prát.

– Vit eru bæði vælnøgd við konsertina, siga tey.

Eivør sigur, at tað var eitt upplivilsi at syngja fyri einari so góðari áhoyrarafjøld.

Eivør Pálsdóttir hevur annars ikki verið nógv í Klaksvík og sungið. Hon sigur, at hon veit ikki, hví tað er.

– Kanska tað er tí, at ein noyðist í ein bát fyri at koma her, sigur hon skemtandi, men so leggur hon afturat, at tað var nakað serligt, eisini tí at Pætur er úr Klaksvík.

Á skránni hjá teimum stóðu bert trý løg. Men so blivu tey spurd av fyrireikarunum, um tey ikki kundu taka eitt lag afturat.

– Vit valdu heilaga nátt, tí tað er ein tann mest jólaligi sangurin, sum eg kenni. So tað avgjørdu vit bara fyrr í dag, sigur hon.

### Nervar

Hann sigur, at hetta var fyrstu ferð, at hann royndi seg á konsert við guitar. Og tað kom hann stak væl frá.

Pætur greiðir frá, at áðrenn konsertin byrjaði, sótu tey bæði og prátaðu.

– Tá gingu fólk allatíðina framvið okkum og søgdu, at tað byrjaði at fyllast av álvara. Og tað var hálvan tíma, áðrenn konsertin byrjaði. So eitt sindur av trýsti var á okkum, men tað gekk bara væl, sigur hann.

Spurdur, um hvussu tað kendist at standa framman fyri so mongum áhoyrarum í Christianskirkjuni og syngja, sigur Pætur, at tað var ikki frítt, at hann hevði nervar. Tað sama sigur Eivør.

– Eg havi altíð eitt sindur av nervum, tað skal til. Men tá Pætur byrjaði at syngja, tá fekk eg rættuliga nervar, sigur hon.

– Men tað var eisini tí, at eg fór fyrst. Líka sum fyri at taka broddin av fyri tær, sigur Pætur við einum skeivum smíli.

Stundi eru ikki til meira prát, tey bæði skulu vitja fólk. Og steðgurin hjá Eivør í Klaksvík er stuttur. Fer avstað seinasta túr við Dúgvuni, og dagin eftir gongur leiðin til Íslands, har konsertir eru á skránni.





# Fantastisk jólakonsert

**Eivør Pálsdóttir og Pætur við Keldu saman við Klaksvíkar Hornorkestri og gospelkórinum Gleði gjørdu jólakonsertina í Christianskirkjuni týskvøldið til ta bestu og mest hugtakandi nakrantíð**

JÓLAKONSERT

*Myndir: Jens K. Vang*
*Orð: Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Tað er avbera torført at lýsa konsertina við orðum. Kenslurnar, sum ein situr eftir við, tá ein hevur hoyrt Eivør Pálsdóttir syngja, ber illa til at seta orð á. Hennara sangur er so inniligur og so reinur, at ein gerst tómur fyri orð. Orð tykjast fátøk í mun til hennara fantastisku rødd.

Fólk sótu lurtaðu við andakt eftir henni. Onkur hevði hug at verða nakað rørdur, men tað er onki at siga til. Hon sang seg inn í hjørtuni og inn undir húðina á fólki.

– Um nakar nemur við meg nú, so brotni eg, segði ein av áhoyrarunum beint eftir Ave Maria.

Vanliga er jólakonsertin í Christianskirkjuni nakað heilt serligt, men í ár bar av. Hetta er eisini fyrstu ferð, at ein so stór stjørna sum Eivør tekur lut á henni.

Eftir konsertina tók onkur til, at tað verður sera torført at skipa fyri konsertini komandi ár, tí hendan var so fantastisk. Og tað verður tað helst eisini, men soleiðis átti ein ikki at hugsað.

Heldur gleðast um, at 1.200 fólk gjørdust hesa ótrúliga uppliving ríkari.

### Tvær stjørnur

Pætur byrjaði framførsluna hjá teimu báðum einsamallur saman við síni guitar. Hann sang vakra jólasangin Í Bethlehem í Dávids stað. Ein innilig framførsla, og tað sást á Pæturi, at tað hevði nógv at siga fyri hann aftur at framføra í sínum heimbýi.

Eivør kom so fram á altarið. Í einum flottum reyðum kjóla við gullmynstri á. Hárið var gjørt, og hon sá út sum ein stjørna. Og beint eftir at hon og Pætur vóru byrjað at syngja Eitt fjós og ein krubba, varð staðfest, at Eivør er ein stjørna. Ein stjørna av teimum øllum. Hon hevur sanggávur sum ongin annar. Røddin fylti alla kirkjuna og fór heilt upp á tindar, sum ein einans kundi ímynda sær vóru til. Uttan nakað klaverfylgispæl ella annað sang hon henda jólasangin, sum øll kenna so væl.

Ein góð byrjan og øll vistu, at tað fór at koma meira.

Næsta lagið hjá Eivør var Ave Maria. Pætur setti seg við klaverið, og samanspælið millum tey bæði var framúr. Og tá hon var liðug at syngja vóru lógvabrestirnir ikki til at taka feil av.

Síðani sungu tey bæði Eg rósu upp sá næla saman við nøkrum hornblásarum. Pætur fyrra ørindið og Eivør seinna. Og so bæði tað seinna ørindi saman umaftur. Tey bæði klinga væl saman og stuðla væl hvønn annan í teirra felagsframførslum.

Eivør og Pætur endaðu teirra framførslu við Heilaga nátt, har Eivør enn einaferð prógvaði, at hon hevur eina fantastiska rødd, sum hon kann gera alt við.

### Jólaligir horntónar

Luturin hjá Klaksvíkar hornorkestri lá so sanniliga ikki eftir á hesi konsertini.

Hóast byrjanin var heldur trilvandi, so kom teirra eyðkenda og vakra ljóð fram. Allarhelst hava nervar verið upp á spæl.

Serliga The Holy City situr eftir sum eitt flott og vælframført lag. Og Anthem úr sangleikinum Chess.

Hornorkestrið framførir vanliga eini tvey ella trý ikki so vanlig løg, um ein kann siga tað so, til jólakonsertina. Og so spæla tey kend jólaløg fyri rest. Hetta skapar ein jólahýr í kirkjuni, sum er heilt serstakur. Nógv hava tað so, at jólini eru ikki byrjað av álvara, fyrr enn tey hava verið í jólakonsert.

Klaksvíkar Hornorkestur er eyðkent fyri sítt ljóð, og tað kemur altíð til sín rætt í Christianskirkjuni, sum man vera tað høli í Klaksvík, sum hevur bestu ljóðviðurskiftini.

### Gleði

Spildurnýggja gospelkórið í KFUM og K var síðani á skránni. Tað einans eitt ára gamla kórið sang tríggjar vakrar jólasangir. Miðalaldurin í kórinum man vera nakað lágur, tí meginparturin av limunum eru fólk millum 15 og 20 ár.

Kórið sang fyrst eitt lag eftir Tore W. Aas, sum eitur Jólanátt. Síðani komu Friður á jørð og Tí okkum barn er føtt í dag. Øll trý sera vøkur løg, og tær báðar ungu solistarnir vaktu so avgjørt kenslur í áhoyrarunum. Men tað var synd fyri kórið, at keyboardið hoyrdist ov væl. Kórsangurin druknaði í undirspælinum, og hann hoyrdist ikki nóg væl.

Eftir hetta sungu tey tvey løg saman við Klaksvíkar Hornorkestur, og tá kom sangurin hjá teimum betur til sín rætt. Hann hoyrdist betur, og kór og orkestur fylgdust væl.

Kórsangur og hornblástur eru altíð gott at hoyra, og jólahýrurin vaknar av álvara.

### Óektað krystall

Samanumtikið ein fantastiska góð, hugtakandi og innilig konsert. Eivør sang sum ein dreymur saman við Pæturi, sum sjálvur eisini átti stóran lut í tí væleydnaði framførsluni.

Tvær livandi stjørnur sum bleiktraðu í advent og eitt vakurt sangpar sum nógv vilja hoyra og síggja í framtíðini. Sannførandi og professionell fyltu tey kirkjuna og hjørtuni hjá øllum sum lýddu á.

Klaksvíkar Hornorkestur eigur uppiborið rós fyri eitt sera væleydnað tiltak og gott spæl. Eisini gospelkórið Gleði setti góðan dám á konsertina.

Men sjálvandi tað sum stendur eftir er allarmest røddin hjá Eivør, tá ið hon í løgunum Ave Maria og Heilaga Nátt prógvaði, at ljósakrúnurnar í Christiankirkjuni ikki kunnu vera av ektaðum krystalli.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri:

## Største uppliving innan tónleik



Hetta var fantastiskt. Púra avgjørt. Eitt tað største upplivilsi eg havi havt innan sang og tónleik.

Tey bæði eru ein ótrúliga vælsaman smeltað duett. Tey kundu tað sama havt sungið saman í mong ár. Eg haldi, at tey eru sum gjørd til hvønnannan.

Tá tað er sagt, so skal eisini sigast, at tað var sera gott fyri jólakonsertina, at Klaksvíkar Hornorkestur hevði biðið tey koma. Tað ger hana meira fjølbroytta, og øll óansæð aldur og kyn fingu sítt í kvøld.

Hornorkestrið var gott, sum altíð. Eg havi altíð hildið, at hornorkestrið ljóðar serliga væl í Christianskirkjuni. Og rómklangurin er jú tann besti her, so hann ger eisini sítt.

Steintór Rasmussen og Jóngerð Biskopstø:

## Avbera góð konsert



– Ein sera spennandi og góð konsert. Stuttligt at síggja tey bæði framføra saman. Og tey stuðlaðu hvønnannan sera væl.

Eivør sang seg inn í mergin á okkum øllum, tað er púra vist. Fýra sangir var ikki nógv, men tað bilar onki, um ein fer svangur eftir meira avstað frá eini tílíkari konsert.

Hornorkestrið var gott, og tað var spennandi at hoyra tað nýggja gospelkórið. Tað hevur nógv gott í sær. Men uttan iva stendur Eivør eftir sum tann heilt stóra á hesi konsertini.